SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

Oktober, 2013

## Fráboðan frá Sjóvinnustýrinum FMA: Um fyribyrgjan av sjóráni og vápnaðum álopi á føroysk skip

Við hesum verður sagt frá, at nýggj Fráboðan er komin frá Sjóvinnustýrinum viðvíkjandi fyribyrgjan av sjóráni og vápnaðum álopi á føroysk skip (hjáløgd).

Fráboðanin kemur í gildi frá 1. november 2012.

Viðvíkjandi kravinum í stykki 3 í Fráboðanini til øll handilsskip at hava

- *skipaðar mannagongdir fyri sigling ella komu í havnir í økjum, har vandi er fyri sjóráni og vápnaðum álopi á skipið*

verður víst til hjáløgdu leiðbeining, sum er gjørd av vinnuni (BIMCO, Intertanko, ICS og NATO Shipping Centre í felag).

Viðvíkjandi nevnda BMP4 í omanfyri nevndu leiðbeining vísa vit eisini til Tíðindabræv nr. 10/2011 (rakstur) og tilhoyrandi leinki til (http://www.cusnc.navy.mil/marlo/Guidance/BMP4_web.pdf).

Sum áður boðað frá (sí Tíðindabræv nr. 01/2012), verða umsóknir frá skipa- og rakstrarfeløgum um loyvi at seta vápnaðar vaktir umborð viðgjørdar hvør sær. Sum higartil fer Sjóvinnustýrið framhaldandi at vísa til týdningin av, at slík loyvi verða givin sambært teimum til eina og hvørja tíð galdandi leiðbeiningum frá IMO.

Fyri fulla yvirliti um hesar leiðbeiningar frá IMO verður víst til MSC.1/Circ.1443 og til heimasíðu teirra http://www.imo.org/MediaCentre/HotTopics/piracy/Pages/default.aspx).

At geva so fullfíggjaða mynd sum gjørligt, skulu vit eisini leggja hjá seinasta tíðindabrævi frá IMO, Circ. letter No. 3394, ið gevur fyribils leiðbeiningar viðvíkjandi økinum við Guinea-flógvan.

Hjálagt:

1. Fráboðan frá Sjóvinnustýrinum nr. 6 frá 7 oktober 2013 um fyribyrgjan av sjóráni og vápnaðum álopi á føroysk skip.
2. Leibeiningar frá BIMCO/Intertanko/ICS/NATO Shipping Centre.
3. IMO tíðindabræv nr. 3394 Fyribils leiðbeiningar til Skipaeigarar, Rakstrarfeløg og Skiparar at verja seg ímót sjóráni í Guinea-flógvanum.

--- 000 ---